

*– ES er ein gyltur møguleiki hjá smáum tjóðum at fáa ávirkan. Lond sum Luksemburg, Malta og Danmark hava líka stórt vald sum eitt nú Týskland hevur, og tí eiga smærru tjóðirnar at síggja stóru møguleikarnar í limaskapi, heldur Claus Larsen Jensen, sum var gestarøðari á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum*
*Mynd: Jan Müller*

# Hvat er ES ikki herligt...

**Gestarøðan hjá Claus Larsen Jensen á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum var ein hálovan av ES limaskapinum úr enda í annan. Formaðurin í Evropanevndini í Fólkatinginum megnaði tíverri ikki at geva eina fjølbroytta mynd av ES, sum javnaðarfólk frammanundan høvdu vónað**

GESTARØÐA UM ES
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tey, sum høvdu vónað at fingið fjølbroytta mynd av ES borðreidda av gestarøðaranum, Claus Larsen Jensen, mundu fara vónsvikin heim av landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum fríggjakvøldið.

Hóast javnaðarfólk undan landsfundinum høvdu sett nøsina eftir at fáa innlit í bæði fyrimunirnar og vansarnar við ES-limaskapi, gjørdist røðan heldur ein hálovan av ES úr enda í annan. Tað skortaði ikki við góðum lýsingarorðum um ES í Læraraskúlahøllini fríggjakvøldið, meðan lítið hoyrdist til teir møguligu vansarnar, ES-limaskapur kann bera við sær fyri Føroyar.

Claus Larsen Jensen hevur áður verið ímóti ES-limaskapi, men broytti síðan hugsan, og er í dag heitur forsprákari fyri felagsskapinum. Av tí, at formaðurin í Evropanevndini áður hevur verið ímóti ES-limaskapi, væntaði tú ein fjølbroytta lýsing av ES, men hetta varð tíverri av ongum.

### Snúningspunkt

Høvuðsboðskapurin hjá Claus Larsen Jensen er, at vit eru øll noydd at fyrihalda okkum til ES í dag, tí felagsskapurin fær støðugt størri og størri ávirkan á gerandisdagin hjá okkum.

– Uttan mun um tú dámar tað ella ikki, so er ES snúningspunktið á flest øllum økjum í dag. Á bæði politiska og búskaparliga økinum fær ES støðugt størri ávirkan, og tað er ein veruleiki, vit mugu fyrihalda okkum til. Fyriheldur tú teg ikki til tann veruleika er skjótt, at tú gerst eftirbátur, heldur formaðurin í Evropanevndini í Fólkatinginum.

Fólkatingslimurin hjá Javnaðarflokkinum vísti á mongu fyrimunirnar við ES-limaskapið og vansarnar at vera uttanfyri.

–Tú ert noyddur at seta tær spurningin, hvussu tú sum tjóð á bestan hátt røkir tíni áhugamál. Vilt tú sjálvur vera har avgerðirnar verða tiknar ella velir tú leiklutin sum passivur samtykkjari av lógum, sum onnur áseta tær at fylgja, spyr Claus Larsen Jensen.

Hann er sannførdur um, at tjóðir best røkja síni áhugamál við at verða partur av ES.

– Sjálvsagt vilt tú hava ávirkan, har tú selir flestu av tínum vørum. Flestu lond hava í dag nógv samskifti við ES, og við limaskapi hevur tú ein væl betri møguleika at ávirka politikkin hjá ES, enn um tú ert uttanfyri, greiðir Claus Jensen Larsen frá.

### Noreg og Ísland á veg

Formaðurin í Evropanevndini í Fólkatinginum vísti á, at bæði Noreg og Ísland er góð dømi um lond, sum eru noydd at góðtaka, at ES setur nærum alt teirra lóggávugrundarlag, hóast londini ikki eru limir í felagsskapinum.

– Londini handla jú nógv mest við ES, og tí eru londini noydd at skipa seg eftir ES-lóggávu. Eg vildi skotið upp á, at góð 98% av teirra lóggávu í dag er ES lóggáva. Munurin er bara, at vit limalondini hava møguleika at ávirka lóggávuarbeiðið, meðan Ísland og Noreg passivt mugu góðtaka tær lógir, ES-londini áseta teimum.

Formaðurin í Evropanevndini væntar, at tað gongur ikki rúm tíð, áðrenn bæði Noreg og Ísland fara at banka á dyrnar í Brússel.

– Í dag eru 460.000 fólk, sum kunnu kalla seg ES-borgarar. Talið av limalondum er økt í 25, og komandi árini fara enn fleiri lond at leggjast afturat. Tú fært meg ikki at trúgva annað, at øll vilja hava ávirkan á, har avgerðirnar verða tiknar, og tí vænti eg innan komandi 10 árini, at bæði Noreg og Ísland fara at royna at fáa limaskap, sigur Claus Jensen Larsen

Hann legði afturat, at talið av nýggju limalondunum ber við sær, at ES hevur minni orku til at samráðast við londini uttanfyri felagsskapin. ES vil heldur nýta orkuna á limalondini enn tey, ið eru uttanfyri, sigur hann.

– ES er ein gyltur møguleiki hjá smáum tjóðum at fáa ávirkan. Lond sum Luksemburg, Malta og Danmark hava líka stórt vald sum eitt nú Týskland hevur, og tí eiga smærru tjóðirnar at síggja stóru møguleikarnar í limaskapi, heldur Claus Larsen Jensen.

### Okkara virðisgrundarlag

Hann heldur, at ES hevur flutt seg frá at verða ein búskaparligur felagsskapur til ein felagsskapur av felags virðum. Hann segði seg fegnast um, at tað fyrst og fremst javnaðar- virðir, ið seta dám á felagsskapin í dag.

– Virðisgrundarlagið hjá Javnaðarflokkum í Evropa setir sín dám ES-politikkin. Við ES limaskapi hevur okkara virðisgrundarlag møguleika at vinna fótafesti í meginpartin av Evropa, og hetta er tað, sum er við at henda. Sosiala vælferðin er eftir mínum tykki snúningspunktið í ES í dag.

Hann heldur at arbeiðið við ES-grundlógini prógvar at virðisgrundarlagið hjá Javnaðarflokkum gongur fremst.

– Tað kennist ótrúliga hugagott, at tað er kjarnupolitikkurin hjá Javnaðarflokkum, sum detir dám á grundlógararbeiðið. Eg haldi tað er skilagott, at vit fáa eina lóg, har eitt felags virðisgrundarlag verður fest á blað. Grundlógin verður tað lættasta JA, eg nakrantíð fari at atkvøða fyri, sigur Claus Larsen Jensen.

### Fakta um gestarøðaran

Claus Larsen Jensen er 51 ára gamal. Hann er fólkatingslimur fyri Javnaðarflokkin. Claus Larsen Jensen varð fyrstu ferð valdur í 1998, og hann hevur síðan 1998 verið limur í Evropanevndini hjá Fólkatinginum. Í løtuni er hann formaður í nevndini.



# Javnaðarflokkurin hevur ein aldurstrupulleika

**Ungi tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannessen, heldur, at flokkurin hevur ein aldurstrupulleika, og hetta sæst best aftur í førda politikkinum**

LANDSSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Javnaðarflokkurin skal fevna um annað enn røktarheim.

Ungi tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannessen, helt á landsstevnuni fyri, at flokkurin hevur ein álvarsaman aldurstrupulleika. Hann vísti argandi á, at tað er av størum týdningi, at flokkurin fær sær nøkur greið sjónarmið um annað enn eldraøkið, og nevndi útbúgvingarøkið og ungdómspolitikk.

– Eg havi verið tingmaður í góðar átta mánaðir, og hvørja ferð eg taki hesi evni upp, verða sjónarmiðini skúgva til viks av hinum javnaðartingmonnunum, segði John Johannessen undir aðalorðaskiftinum fyrrapartin leygardagin.



*–Eg havi verið tingmaður í góðar átta mánaðir, og hvørja ferð eg taki hesi evni upp, verða sjónarmiðini skúgva til viks av hinum javnaðartingmonnunum, segði John Johannessen undir aðalorðaskiftinum fyrrapartin leygardagin.*
*Mynd: Jan Muller*

Ungi tingmaðurin tók millum annað støðið í einum samgongufundi í samband við fíggjarlógina í farnu.

– Helvtin av tingmanningini hjá Javnaðarflokkinum segði seg taka undir við Fólkaflokkinum um at skerja lestrarstuðulin. Eg seti mær bara spurningin, hvussu vit í flokkinum skulu fáa tey ungu upp í flokkin við slíkum politikki, vísti John Johannessen á.

Sonevndi Jokarin á løgtingsvalinum hjá Javnaðarflokkinum helt, at flokkurin átti at virka fyri at fáa javnstøðu millum tey eldru og yngru í flokkinum, tí í løtuni eru ungu kreftirnar við skerdan lut.

### Burturvið

Bæði Henrik Old og Gerhard Lognberg gjørdist argir inn á útsagnina hjá John Johannessen um skerjingina av lestrarstuðulinum.

– Eg má siga, eg eri djúpt sjokeraður av tær. Tað er ein beinleiðis lygn, at vit vildu skerja lestrarstuðulin, tí formaðurin í tingbólkinum, Kristian Magnussen, slerdi fast, at flokkurin ikki ætlaði at skerja lestrarstuðulin, sigur Henrik Old.

Sandoyartingmaðurin, Gerhard Lognberg, tók fult undir við Henriki Old.

# Kvinnubólkurin úr dvalanum

**Kvinnurnar í Javnaðarflokkinum hava tikið stig til at endurstovna kvinnubólkin. – Endamálið er at fáa kvinnurnar meir virknar í flokkinum. Tað er rættiliga umráðandi, at vit fáa tær at stilla upp og fáa tær valdar í nevndirnar, tí í løtuni hava vit eitt rættiliga einoygt demokrati, sigur ein av oddakvinnunum, Elin Lindenskov**

LANDSSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Kvinnurnar vóru rættiliga væl umboðaðar á landsstevnuni hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið. Á myndini síggjast tríggjar teirra: Jona Henriksen, Nita Næs og Hervør Eidesgaard*

Javnaðarflokkurin skrivaði søgu í 1992, tá Marita Petersen tók við sum fyrsti kvinnuligi løgmaður í Føroya søgu. Síðan hevur gingið striltið hjá kvinnunum í Javnaðarflokkinum, og á løgtingsvalinum 20. januar í ár, fekk flokkurin onga kvinna valda á ting.

Hesa støðu ætla kvinnurnar í Javnaðarflokkinum at gera nakað við, og tí hava tær tikið stig til at endurstovna kvinnubólkin.

– Endamálið er at fáa kvinnurnar meir virknar í flokkinum. Tað er rættiliga umráðandi, at vit fáa tær at stilla upp og fáa tær valdar í nevndirnar, tí í løtuni hava vit eitt rættiliga einoygt demokrati, sigur ein av oddakvinnunum, Elin Lindenskov.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Javnaðarflokkurin hevur ein kvinnubólk, tí fyri góðum 10 árum síðan vóru kvinnurnar eisini skipaðar í flokkinum.

### Væl mótikið

Elin Lindenskov greiðir frá, at ætlanin er at fáa royndu kvinnurnar í flokkinum at leggja kvinnunum á teimum smærru støðunum kring landið lag á. Ætlanin er, at bólkurin skal møtast einar tvær ferðir um árið.

– Allir Javnaðarflokkar í hinum norðanlondunum hava kvinnubólkar, og ætlanin er eisini, at vit skulu møtast við teimum, vísir Elin Lindenskov á.

Býráðslimurin í Tórshavnar kommunu fegnast um stóru umrøðuna, sum javnstøðuøkið hevur fingið á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum.

– Fyri 10 árum síðan var tað illa dámt, at vit høvdu ein kvinnubólk, tí menninir hildu, at vit ætlaðu at yvirtaka flokkin. Nú er kortini øðrvísi, tí teir hava verið rættiliga positivir. Tað tykist sum um, at flokkurin nú vil hava gongd á málið. Eg haldi, at annar til triðji hvør maður hevur nevnt javnstøðu á landsstevnuni, og tað er ótrúliga positivt, heldur Elin Lindenskov.

Hon leggur afturat, at kvinnurnar í Javnaðarflokkinum hava fingið ein góðan stuðul frá landsstýrismanninum í javnstøðumálum, Hans Paula Strøm, tí hann lyftir javnstøðuna upp, sum Elin Lindenskov málber seg.

*Fær Javnaðarflokkurin umboðan á tingi næstu ferð?*

Tað er sjálvsagt eitt mál hjá okkum, og tað vóni eg tí sanniliga. Tað besta hevði verið at fingið helvtina av umboðanini, sigur Elin Lindenskov skemtandi.

## Vítt er til veggja

**Limirnir í Javnaðarflokkinum eru rættiliga ymiskir má málið, hvussu høgt javnstøða skal raðfestast í flokkinum**

LANDSSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á landsstevnuni um vikuskiftið hjá Javnaðarflokkinum varð dúgliga kjakast um javnstøðu. Tað varð fleiri ferðir havt á lofti, at tað er ikki nøktandi, at flokkurin onga kvinnuliga umboðan hevur á tingi.

Vítt er til veggja í flokkinum um, hvussu høgt javnstøðuøkið skal raðfestast í flokkinum. Elin Lindenskov og Hans Pauli Strøm gingu á odda, og ynsktu, at Javnaðarflokkurin hevur ein greiðan politikk á økinum. Hinvegin var Gerhard Lognberg ikki var til at høgga í.

– Alt, sum eg kenni til hava maður og kvinna havt hvør sín leiklut í samfelagnum. Tað hevur altíð verið vanligt, at mamman var heima hjá børnunum, meðan pápin var úti. Eg dugi ikki at síggja, at tað er neyðugt við broytingunum á tí økinum, sigur Gerhard Lognberg.

Sandoyartingmaðurin legði afturat, at tað vóru kvinnurnar sjálvar, ið áhaldandi hildu seg aftur, tá boð vóru eftir teimum um at stilla upp til løgtings- og kommunuval.

### Skomm

Eitt av kvinnuligu valevnunum hjá Javnaðarflokkinum í Suðuroynni, Nita Næs, og Jákup Birgir Mohr býráðslimur á Sandi eru av teirra áskoðan, at Javnaðarflokkurin eigur at raðfesta samhaldsfasta og eldraøkið hægri enn øki, sum viðgera etik, moral, kyn og seksualitet.

Hetta fekk landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum at tala at.

– Tað er ein stór vanærulig skomm um Javnaðarflokkurin ikki hevur ein greiða støðu á javnstøðuøkinum, tí tað eigur ein Javnaðarflokkur altíð at hava. Eg taki tí slettis ikki undir við teimum, sum halda, at vit ikki eiga at raðfesta økið høgt, segði Hans Pauli Strøm undir aðalorðaskiftinum.